


## Útnorður og klima

Við nýggju bókini Climate Change and the North Atlantic vil samtakið NORA geva eitt íkast til kjakið um veðurlagsbroytingar sæð frá einum serstøku norðuratlantiskum sjónarhorni. Í bókini verður hugt nærri eftir hvørja ávirkan veðurlagsbroytingarnar hava á havið, jørðina, fólkið, tað livandi tilfeingi, flutning og geopolitikk. Síðst í hvørjum kapitli er eitt ítøkiligt dømi um temaið, sum er viðgjørt. Grafikarin Ole Wich hevur gjørt permu og og gjøgnumgangandi illustratiónirnar í bókini.




*Skálaberg er nú á veg heim til Føroya, og sambært Jørgen Niclasen er tað eitt skipað samspæl millum allar partar, ið loksins førdi til eina loysn*

# Samspæl millum allar partar

**Málið um Skálaberg hevur lopið hvøkk á føroyskar myndugleikar, og tað tók drúgva tíð at finna eina loysn. Men tað eydnaðist tó til endans við samstarvi millum nógvar aktørar**

SKÁLABERG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað vardi neyvan nakran, at tað skuldi gerast størsta kreppan millum Føroyar og Russland, tá Skálaberg 19. november varð tikin av russisku sjóverjuni og førdur til Murmansk.

Roknað var við, at talan var um eina misskiljing, sum skjótt fór at verða loyst, men fyrstu ábendingarnar um nakað meiri álvarsamt komu tó, tá ákærurnar móti skipinum vórðu lagdar fram.

Fiskimálaráðið var fyrst inni í myndini, og tá russiska samráðingar sendinevndin um fiskivinnusamstarv var í Føroyum var Skálaberg framvegis afturhildin. Málið var ikki á skránni sum so, men var kortini viðgjørt á fundinum.

Roynt var við samráðingum at tosa russar til rættis, men tað gjørdist skjótt illgruni um, at okkurt annað og meiri búði undir.

- Vit hava alla tíðina arbeitt í tøttum samstarvi við Fiskimálaráðið og vit hava so líðandi arbeitt okkum upp gjøgnum tær diplomatisku skipanirnar fyri at fáa eina loysn á málinum, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkismálaráðharri.

Arbeitt var at byrja við á embætismanastigi, men sum tíðihn leið gjørdist greitt, at tað slapst ikki á mál tann vegin.

### Hamburg

Í síðstu viku setti Jørgen Niclasen seg so í samband við danska starvsbróður sín, Per Stig Møller, og saman løgdu teir síðani eina strategi fyri, hvussu farast skuldi fram.

Teir báðir samdust skjótt um, at nú var so mikið útliðið, at fekst eingin loysn fyrst í hesi vikuni, bleiv málið lagt fyri Altjóða Havdómstólin í Hamburg.

- Nú kom málið so fyri í rættinum í Murmansk mánadagin, og sjálvandi bíðaðu vit eftir úrslitinum, sum vit vóru til reiðar at leggja málið fyri dómstólin í Hamburg, spurdist einki burtur úr mánadagin, sigur Jørgen Niclasen.

Saman við Per Stig Møller hevði føroyski uttanríkismálaráðharrin sent russiska uttanríkismálaráðharranum bræv og gjørt honum greitt, at fanst ikki ein loysn á málinum mánadagin, fór málið at verða skotið inn fyri havrættardómstólin í Hamburg í gjár.

- Nú skal eg ikki siga, at tað var hetta, ið fekk glið á málið, men ein loysn kom so. Men eg skal undirstrikað, at samlaða úrslitið var eitt samsæl millum allar aktørar, og teir vóru nógvir, sigur Jørgen Niclasen.

Nú verður so ein eftirmeting av allari tilgongdini, men uttanríkismálaráðharrin er sannførdur um, at teir eru farnir rætta vegin við at arbeiða á diplomatiska støðinum.

# Hummaramálið tikið upp til dóms

**Eftir drúgt rættarmál hevur dómarin nú tikið sonevnda hummaramálið upp til dóms. Ákærin krevur dóm eftir ákæruskrivinum, meðan verjarnir krevja frídøming**

HUMMARAMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Mest umrødda – og í eygunum hjá mongum minst týðandi – mál í áravís fær nú sín enda. Sonevnda hummaramálið verður nú tikið upp til dóms.

Í stuttum snýr málið seg um, hvørt nakir journalistar og ein hummaraútflytari hava framt djórapínslu.

Á Faroe Fish Fair 2005 hevði Marni Simonsen ein bás, har hanneitt nú bjóðaði livandi hummarahalar til fólk. Hendan forkunnuga góðbita høvdu Georg L. Petersen og myndamaðurin Kalmar Lindenskov gjørt av at royna, og í blaðgrein greiddi Georg L. Petersen frá, hvussu tað var at eta livandi hummarahala.

Hetta fekk táverandi landsdjóralækna, Peter Østergaard, at melda blaðmannin og myndamannin til løgregluna. Og málið hevur koyrt líka síðani.

Í síðsti viku kom málið so langt um leingi fyri rættin, og í dag var tað tikið upp aftur til endaliga avgreiðslu.

Í rættinum í dag var bert eittans vitni, nevniliga John Johannesen, sum sjálvur hevði gjørt løgregluna varðuga við, at eisini hann hevði verið til staðar á Faroe Fish Fair og hevði roynt hendan livandi hummarahalan.

Undir avhoyringini kom fram, at hann hevði hugsað lítið um hesa hendingina, og at hann undraðist eitt sindur á, at bert blaðmaðuri og myndamaðurin vórðu ákærdir fyri at hava etið hesar hummarahalarnar.

Hinvegin helt hann ikki, at talan var um nakað prinsipielt mál um talu- ella pressufrælsi.

Dokumentatiónin var óvanliga drúgv fyri eitt so lítið týðandi mál, og tað gjørdist proseduran eisini. Í stuttum kan sigast, at ákæruvaldið mælti til, at teir ákærdu, Georg L. Petersen, Kalmar Lindenskov, Henrik K. Jeppesen og Marni Simonsen, vórðu dømdi eftir ákæruritinum, meðan verjarnir mæltu til frídøming.

Dómur verður sagdur seinni.

